

*- Ein fólkaatkvøða um eina nýggja stjórnarskipan, er samstundis ein fólkaatkvøða um loysing, sigur formaðurin í Sambandsflokkinum. Nei, sigur løgmaður*

# Fólkaatkvøða um loysing í 2010

**Tá ið fólkaatkvøða verður um eina føroyska stjórnarskipan í 2010, verður talan í veruleikanum talan um eina fólkaatkvøðu um loysing, staðfestir formaðurin í Sambandsflokkinum**

STJÓRNARSKIPAN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fer nýggja stjórnarskipanin, sum samgongan ætlar at gera, at hava sama rættarliga gildi, sum danska grundlógin hevur, ella verður hon undir donsku grundlógini?

Tað var ein spurningur, sum Kaj Leo Johannesen, tingmaður fyri Sambandsflokkin, vildi hava løgmann at svara upp á í tinginum í morgun.

Hann vildi eisini hava at vita um tað ber til at seta stjórnarskipanina í gildi, hóast hon ikki er í samsvari við donsku grundlógina.

Løgmaður staðfesti, at ein føroysk stjórnarskipan loysir ikki Føroyar frá Danmark.

- Men hon er ein áseting um, hvussu føroyingar skipa seg innanlands og hon skal eisini staðfesta, hvussu farast skal fram, vilja vit hava loysing.

Nú skal so ein serlig nevnd setast at gera stjórnarskipanina liðuga.

Men um stjórnarskipanin samsvarar við donsku grundlógina, er ein spurningur fyri serfrøðingum í stjórnarrætti, sum hann ikki vildi leggja seg út í.

Men hann ivaðist ikki í, at nevndin, sum verður sett at gera stjórnarskipanina lidna, eisini setir seg í sambandi við danskar myndugleikar fyri at finna loysnir á møguligum ósemjum.

## Atkvøðugreiðsla um loysing

Kaj Leo Johannesen helt ikki, at hann hevði fingið eitt greitt svar.

Men hann vísti á, at eftir tí, sum liggur í kortunum, verður tann nýggja stjórnarskipanin uppfata sum okkara evsta lóg, sum er yvir øllum øðrum lógum.

Har stendur í uppskotinum, at stjórnarskipanin er framum lógir. Ongin lóg ella siðvenja má tí vera hildin at galda, bara tí at hon er eldri enn hendan skipan, ella hevur verið told í langa tíð.

- Sostatt verður fólkaatkvøðan í 2010 rætt og slætt ein fólkaatkvøða um loysing, tað sigur hetta heilt greitt.

Hann helt, at onki er meiri rímiligt enn tað, at føroyingurin fær greitt at vita, hvat hann fer til fólkaatkvøðu til.

Og hann framvegis, at løgmaður smeyg sær undan at svara, antin hann helt, at Stjórnarskipanin er undir ella yvir donsku grundlógini.

Hann helt eisini, at tað var heilt burturvið at hugsa sær, at Tjóðveldi fer at leggja nakað út til fólkaatkvøðu, sum ikki ber loysingina við sær, men sum hinvegin er undir donsku grundlógini.

Jóannes Eidesgaard staðfesti enn einaferð, atspuringurin um eina føroyska stjórnarskipan, er ein føroysk verkætlan og tað er hetta fólki, sum her býr, ið skal atkvøða.

Hann helt eisini, at Kaj Leo Johannesen sá trøll á alljósum degi.

- Í grundlógini eru nøkur rættindi, sum langt síðani eru yvirhálað av nýggjum, mannarættindasáttmálum.

- Tí skulu vit sláa kalt vatn í blóðið og eg havi tað álit, at endaliga uppskotið til eina stjórnarskipan, sum fólkið skal taka støðu til í 2010, verður borðbært.

Hann vísti á, at føroyingar og danir hava hvør sína uppfatan av stjórnarskipanarlógina.

- Men so leingi partarnir duga at finna veg burtur úr ósemjuni, ber hetta á mál, akkurát sum tað gjørdi, tá ið yvirtøkulógin var fyri, tí tá høvdu partarnir eisini hvør sína uppfatan.

# Háskúli í Føroyum fyri norðurlendingar

**Arbeitt verður nú við at skipa háskúla í Føroyum, sum serliga er ætlaður íslendingum, grønlendingum og føroyingum, men aðrir norðurlendingar eru eisini vælkomnir**

EFTIRSKÚLI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er ætlanin at taka spurningin upp um at styovna ein norðurlendskan háskúla í Føroyum.

Tað kom fram í Løgtinginum í morgun.

Magni Laksáfoss, løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin, vísti á, at Útnorðurráðið hevur samtykt at virka fyri at stovna útnorðurháskúlar í Føroyum, Íslandi og í Grønlandi.

Útnorðurráðið mælti í sama viðfangi á myndugleikarnar í Føroyum, Íslandi og í Grønlandi um at seta arbeiðsbólkar at fyrireika slíkar háskúlar, sum serliga skulu vera ætlaðir myndugum, lesandi fólki úr Grønlandi, Íslandi og í Føroyum, men aðrir norðurlendingar vóru eisini vælkomnir.

- Tað er eisini ætlanin at granskarar kunnu hava støð á hesum háskúlum í sambandi við granskingarverkætlanir, sum hava við tey trý londini í útnorðri at gera.

Magni Laksáfoss vísti á, at Útnorðurráðið er av teirri áskoðan, at eitt slíkt tiltak hevði styrkt bondini ímillum tey trý londini í útnorðri.

Tí vildi hann hava at vita frá Høgna Hoydal, landsstýrismanni í uttanríkismálum, hvørja støðu, nýggja CHE samgongan hevur til málið.

Bæði Kári P. Højgaard og Alfred Olsen tóku fult undir við málinum og mæltu til at fáa gongd á málið.

Páll á Reynatúgvu vildi eisini hava at vita, um tað kundi hugsast, at ein slíkur háskúli onkusvegna kundi verðið tengdur á ætlaða listaskúlanum á Sandi.

Høgni Hoydal segði, at hann kendi málið væl, tí hann hevði verið við til at seta tað á skinnarar.

Hann staðfesti, at málið er ikki komið á landsstýrisborð enn, men at hann er sinnaður at taka tað upp beinanvegin fyri at fáa gongd á.

Hann staðfesti eisini, at hann tekur fult undir við málinum. Hetta er ikki viðgjørt í sambandi við Listaskúlan á Sandi, men kanska ber til at knýta báðar verkætlanirnar saman.

Magni Laksáfoss vísti á, at tekur landsstýrið ikki málið upp av sínum eintingum, er hann sinnaður at gera tað sjálvur.